# Balslev CUP 2003

HB bjóðar øllum dreingjum og gentum at gera lið til innanadurakapping í fóbólti, í høllini á Hálsi í døgunum 28.02 - 01.03 2003

| Aldursbólkar | Føðiár |
| --- | --- |
| Pinkur | (93-94) |
| Gentur 10-12 | (91-92) |
| Smágentur 12-14 | (89-90) |
| Gentur 14-17 | (86-87-88) |
| Pinkulingar | (95-96) |
| Smápiltar | (93-94) |
| Piltar | (91-92) |
| Smádreingir | (89-90) |
| Dreingir | (87-88) |

Seinasta freist at melda seg til er mikudagin 26. februar

Tilmelding hjá:

Oddmar Andreasen
210194 / 310760

Pætur Clementsen
220566 / 315616




Á hvørjum liði eru 5 leikarar. Í deildunum gentur 14-17 og dreingir eru bert 4 leikarar.
Loyvt er at hava ein skiftisleikara.
Luttøkugjald er kr. 200 fyri hvørt liðið.
Liðini skulu hava fótbóltsnøvn.
Balslev stuðlar kappingini og letur heiðursmerki til tey 3 fremstu liðini í hvørjum aldursbólki

Havnar Bóltfelag



# DAEWOO - MATIZ

einans 105.750,-




4 hurðar • centrallás • powerstýring
el. rútavindara • metallakk • 3 ára garanti

Útgjald kr. 26.500, rest kr. 1.750,- um mánaðin í 60 mánaðir.
Hví keypa ein brúktan bil, tá tú kanst fáa ein nýggjan so bíliga

DAEWOO
- ein skilagóð avgerð!

P/f Esmar Simonsen
Tel. 44 44 05 · Fax 44 46 29



Reparera bilar
Tryggingarskaðar
Upprætting og lakering

Alt mekaniskt arbeiði og styling til bilar

Auto-Tek
Argjaboðagøta 5 ·
Tlf. 321206 · Fax 321236
eftir kl. 17.00 á Tlf. 221006



Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo


**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingar

Hesi avloysarastørv sum sjúkrarøktarfrøðingur á **B7** eru leys at søkja:

- á starvsbrøki 0,6 í skiftandi vaktum *skjótast gjørligt* til og við 29. februar 2004
- fulltíðarstarv í skiftandi vaktum frá *skjótast gjørligt*, til og við 31. juli 2003
- á starvsbrøki 0,8 í skiftandi vaktum frá 1. mai 2003 ella eftir avtalu, til og við 31. oktober 2003

Deildin hevur 15 seingjapláss og tekur sær av sjúklingum við m.a. onkologiskum-, nýra-, lunga-gikta- og ryggjasjúkum v.m.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medicinska røkt og viðgerð
- góð samstarvsevni

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Evu Mortensen, deildarleiðara á **B7**, telefon 31 35 40, lokal 107 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur, lokal 300, e-post asap@ahs.fo

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 28. februar 2003 kl. 12.00

Landsfelag Pensjónistanna

# Ferðatilboð

Landsfelagið sigur frá at Pensjónistafelagið H.Ø.F.T. ger útferð til Noregs tann 25. august.

Til hendan túrin eru 8-10 pláss leys.

Eisini ger Sunda pensjónistafelag eina útferð til Ísland í mai mánaði, og kunnu fólk eisini tekna seg til hendan túrin.

Fólk ið hava áhuga í hesum, biðjast um at ringja til ávikavist Thorbjørn Lisberg, formann, tlf. 37 11 50 ella Thora Magnussen, formann, tlf. 42 33 57.

**Landsfelag Pensjónistanna**

veitst tú ikki tað?



**Klaksvíkar Sjúkrahús**
**Deild A og M**

# Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsuatstøðingar

Søkt verður eftir feriuavloysarum í tíðarskeiðnum 16. juni til 15. august 2003. Sjúkradeildirnar verða samanlagdar frá 01. juli til 15. august.

Lønar- og setunartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini frá:

Synnøvu Hansen, deildarsjúkrarøktarfrøðingi, deild M, tlf. 455463 lokal 403, ella teldupost kssyn@ahs.fo ella

Annu Løwe Sørensen, deildarsjúkrarøktarfrøðingi, deild A, tlf. 455463 lokal 519, ella teldupost ksanlo@ahs.fo ella

Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu, lokal 106, ella teldupost ksjona@ahs.fo

Umsókn saman við prógvi og autorisatión verður send til:
Umsjónarmannin,
Klaksvíkar Sjúkrahús
FO-700 Klaksvík

Umsóknarfreist 15. apríl 2003.

# Bátur til sølu



Stórt føroyskt bygt 8 mannafar til sølu við fiskiloyvi.

Báturin er bygdur í 1984 og hevur ein Yanmar 34 HK motor frá 1992. Øll kravd neyðútgerð er umborð og fylgir við eins og sergjørd presending bæði frammi og aftan.

Báturin er væl røktur og annars í besta standi.

Vit miða eftir, at sølan fer fram sum skjótast.

Nærri fæst at vita við at ringja til

**tlf. 219652 ella 211817 aftaná kl. 17**

# PR-starvsfólk
## til Sjónvarp Føroya

Verandi PR-fólk okkara leitar sær nýggjar avbjóðingar, og tí søkja vit eftir nýggjum fólki til hetta sera spennandi starvsøkið á stovni okkara. Arbeiðið umfatar upplýsing til hyggjararnar og til lýsarar stovnsins.

**Uppgávurnar:** Tú skalt leggja til rættis og framleiða lýsingar um sendingar okkara, leggja til rættis upplýsingartiltøk í sambandi við teir ymisku tættirnar í virksemi sjónvarpsins og hava um hendur dagligu umsitingina av heimasíðu okkara. Tú skalt seta fokus á sendingar okkara og í samráð við leiðsluna leggja strategiina fyri lýsing og marknaðarføring okkara av sjónvarpinum.

Tú verður knýtt/ur at skrádeildini, men kemur harumframt at hava tætt samstarv við marknaðardeildina. Fyri tann rætta persónin er talan um eitt fjølháttað og spennandi starv við fjølbroyttum uppgávum og nógvum avbjóðingum.

**Útbúgving og royndir:** Tú hevur útbúgving og /ella royndir innan sjónvarpsframleiðslu og marknaðarføring. Tú hevur so mikið av vitan um grafiska formgeving og sjónvarpsframleiðslu, at tú kanst viðgera og taka støðu til ítøkilig hugskot og geva grafikarum og myndafólki ítøkiligar uppgávur. Tú dugir at hugsa strategiskt og leggja longri upplýsingarátøk til rættis. Tú ert kreativ/ur og hevur lætt við at samstarva.

**Løn og setanartreytir:** Starvið verður sett og lønt sum programmfólkastarv sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Starvið verður sett frá 1. apríl 2003 ella skjótast gjørligt.

Umsóknir við CV, prógvum og viðmælum verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. februar kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóra, telefon 340400.

svf
Sjónvarp Føroya, M.A. Winthersgøta 2, 100 Tórshavn

# *Starv á Hagstovuni*

*Hagstova Føroya*

*er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins.*

*Stovnurin er í trimum deildum - Hagdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenningnum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber.*

*Á stovninum arbeiða 14 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT tøkningar og skrivstovufólk.*

*Hagstovan hevur tørv á fólki til at fáa nýggjar hagtalsuppgerðir til vega um arbeiðsmarknaðar-, lønar- og inntøkuviðurskifti.*

*Til at hava hesa uppgávu um hendi, sóknast vit eftir einum væl útbúnum fólki, sum hevur áhuga í hagtølum og evni at fást við tøl. Verkætlanin í hesum sambandi fara fram í tøttum samstarvi við KT tøkningar og tí vera eisini krøv sett um góð samstarvsevni og góð samskiftisevni um teldutøkni.*

*Besti førleikin er akademisk útbúgving, búskaparfrøðilig ella samfelagsfrøðilig, men hevur tú aðra hægri útbúgving og haraftrat royndir ella áhuga í samfelagsmálum, kann hetta vera nøktandi førleiki til starvið. Royndir av arbeiði við telduforritum og datagrunnum geva fyrimun.*

*Starvið verður lønt eftir galdandi sáttmála millum Landsstýrið og avvarðandi fakfelag.*

*Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1.mars 2003.*

*Set teg í samband við Axel Nolsøe, deildarleiðara, ella Hermann Oskarsson, stjóra, á Hagstovu Føroya, telefon 352800, vilt tú hava meira at vita um starvið.*

www.sosialurin.fo